# Tutl tutlar víðari!

**Tað er onki at dylja yvir, at 2005 var eitt framúr ár hjá plátufelagnum Tutl. Í hesum døgum royna bæði Dimmalætting og Sosialurin at gera upp, hvørjar fløgur vóru bestar í árinum. Og tað tykist sum um tað er rættiliga breið semja um, at fløgurnar Viva la Repulica, Koma, A Place to stand on, Dámliga gøtan og Morning Dew eru millum tær bestu. Felags fyri hesar fløgur er, at tað er Tutl sum stendur fyri útgávuni**




**FLØGUR**
**Rókur Jákupsson Jakobsen**
**rokur@sosialurin.fo**

Tutl fløgur eru væl umboðaðar í tilnevningini um at gerast ársins fløga.Talan er um blandaðan tónleik, men felags fyri tær allar er, at Plátufelagið Tutl hevur útgivið allar tilnevndu fløgurnar uttan tí eini. Tann eina, sum Tutl ikki hevur útgivið, er fløgan "Førist" hjá Páll Finnur Páll. Planet setti seg í samband við skrivaran í Tutlnevndini fyri at fregnast um, júst hví Tutl er so væl umboðað í tilnevningini.

"Tað hevur gingið sera væl hjá Tutl í ár", sigur Knút H. Eysturstein, sum hevur verið skrivari í Tutlnevndini í tvey ár. Afturat honum eru Sólarn Solmunde og Ólavur Olsen í nevndini. Hann fortelur okkum, at Tutl dominerar útgávumarknaðin í Føroyum í løtuni, og sostatt er nógvur tónleikur at taka av í úrvalinum hjá Tutl. Men orsøkin til at tað hevur ligið so væl fyri man vera tann, at tað eru góðir bólkar sum velja at koma til Tutl, og bólkarnir tykjast at vera fegnir um samarbeiði.

## Tutl stuðlar føroyskum tónleiki

Spurdur um hví bólkar velja at geva tónleikin út umvegis Tutl, metir Knút, at Tutl bjóðar bólkunum holla vitan og hjálp. "Tá ið bólkar velja at geva tónleik út ígjøgnum okkum (Tutl, blðm.), vita teir at vit hjálpa teimum við nógvum viðurskiftum. Vit hjálpa teimum fíggjarliga við at framleiða og útgeva tónleikin. Men tað sum kanska ger Tutl til nakað serligt fyri bólkarnar er, at teir koma á okkara katalog sum útlendingar hava atgongd til. Vit selja tónleikin í sølubúðum, men sanniliga eisini á netinum, og hetta er helst serliga spennandi fyri tónleikarar sum vilja marknaðarføra seg í útlandinum.

At tónleikurin verður seldur umvegis heimasíðuna www.tutl.com, gevur útgávuni veldugar møguleikar at gera vart við seg aðrastaðni enn her í Føroyum. Men hetta gerst alsamt meiri vanligt í útheiminum, og sjálvandi vil Tutl ikki verða eftirbátur hvat tí viðvíkur.

Øll hendan hjálpin byggir á tí ásannan, at tað er tungt og hart at útgeva tónleik, um man sjálv/ur skal hanga uppá tað heila. Sostatt geva vit tónleikarunum eina hjálpandi hond, og teir geva okkum tað sum vit liva av - tónleikin.

Knút vísur eisini á, at Tutl ikki velur og vrakar útgávur. Øll sleppa framat hjá Tutl, tí hetta er eitt plátufelag sum stuðlar øllum tónleiki.

## Botnstøði hækkar

Fløgurnar sum eru tilnevndar í strembanini eftir at gerast ársins fløga, eru mestsum nútímans tónleikur. Um nakað undantak er, so er tað "Dámliga gøtan" hjá Tveimum av Kamarinum". Men tað er ein ásannan, at fløgan "Alt" hjá Kim Hansen ikki er at finna millum hesar fløgur, hóast hon er tann mest selda fløgan í 2005. Hví man tað vera, spyrji eg Knút.

"Tað er ilt at meta um, men tað eru dómsnevndir sum avgera slíkt. So man kann ikki siga, at tað endiliga er samanhangur millum kvantitet og kvalitet, tí tað eru fólk sum hava skil fyri tónleiki, sum meta um dygdina", sigur Knút.

"Men vit kunnu staðfesta, at støðið á tónleikinum, sum kemur út í Føroyum, er hækkandi. Vit leggja merki til, at tónleikarirnir kykla meiri um tónleikin nú enn teir gjørdu áður, og hetta sæst aftur í kvalitetinum í útgávunum. Ljóðið er gott og tónleikurin er væl spældur. Tað merkir í síðsta enda, at tað gongur rætta vegin í føroyska tónleikinum", vísur ein avgjørdur Knút H. Eysturstein á.

## 2006?

Tutl hevur sum sagt verið sera virkið í 2005, men hetta merkir als ikki, at 2006 verður minnið spennandi. "Risastova" við Yggdrasil er júst útkomin, og aðrar spennandi verkætlanir eru á gáttuni. Ein føroyskur rappari, sum er búsitandi í Kanada fer at geva eina fløgu út umvegis Tutl, og afturat tí koma Gestir og Marius út við hvør sínari fløgu.

At enda spyrji eg Knút, hvørja føroyska fløgu honum dámdi best í 2005. "Tað má helst verða "Viva La Repulica" hjá 200", sigur hann. "Hon var eitt veruligt wake up call hjá okkum øllum. Vit fingu eitt spark í reyvina frá 200, og tað vóru ikki bara vit, sum dáma tónleikin hjá teimum, sum merktu tað. Fløgan er sera væl spæld, og ljóðið er í topp, so vit koma ikki uttan um, at hetta var ein hin besta føroyska fløgan í nógv, nógv ár", sigur Knút Háberg Eysturstein at enda.